## Beethoven og Sunleif

Í hesum døgum eru fimm tónleikarar úr tónleikabólkinum Aldubáruni ávegis til Eysturríkis at hava konsertir. Talan er um tríggjar konsertir í Wien og eina í býnum Zwettl, ið liggur nærindis eysturríkska høvuðsstaðnum. Á tí eini konsertini fer bólkurin bert at framføra føroyskan tónleik við millum øðrum Sunleifi Rasmussen, Kristiani Blak og Kára Bæk. Við sær til Eysturríkis hava tey í Aldubáruni sjálvandi eisini verk úr tí klassisku tíðini. Violinsonata eftir Beethoven, duettir hjá Lutoslawski og sologittarverk hjá Sor eru krýdd omaná. Aldubáran og Felagið Føroysk Tónaskøld hava úr Eysturríki fingið áheitan um samstarv frá tónaskaldafelagnum OEKB og frá tónlistaráhugafelagnum INOEK.

## Nýggjur skaldskapur á føroyskum

Tíðarritið Vencil kemur 5. oktober 2007 út við sínum triðja nummari. Av teimum føroysku uppruna prosatekstunum kunnu nevnast ein ritroynd eftir Tórodd Poulsen, har hann greiðir frá sínum uppvøkstri í Havn, og hví hann yrkir, sum hann ger, og stuttsøgur eftir Sólrúna Michelsen, Sámal Kristian Jacobsen og Oddfríð Marna Rasmussen. Av skaldskapi á bundnum máli eru yrkingar eftir Hanus Kamban, Heðin M. Klein, Rannvá Skeel Johannesen og Katrina Reinert. Kanska mest áhugaverdi týddi teksturin hesaferð er stuttsøgan “Vár í øsku” eftir sýriska Zakariyya Tamer. Hetta er ein næstan surrealistisk stuttsøga, sum er týdd til føroyskt beinleiðis úr arabiskum.

# Altjóða floghavn

**Sosialurin kann í dag almannakunngera nýtt stórt uppskot um altjóða floghavn í Nólsoy. Á Borðuni er rúm fyri einum stórum krossvølli, stórum terminalum, parkeringsøki, hotellum og øðrum, men higartil hevur hesin møguleiki als ikki verið kannaður.**

FLOGVALLIR

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Sørvágur, Søltuvík og Glyvursnes hava pláss fyri hvør sínum lítla flogvølli, men í Nólsoy er pláss fyri stórari floghavn við langum krossvølli og alskyns bygningum í einum stórum upplandi.

Álíkavæl hevur Nólsoy ongantíð verið havd almennt á lofti sum møguligt øki fyri nýggjari altjóða floghavn. Fyrr enn nú. Sosialurin kann í dag avdúka spennandi uppskot til altjóða floghavn á Borðuni. Uppskotið eigur Magnus Hansen, sum hevur drúgvar royndir sum arkitektur bæði innan tað privata og almenna.

- Hetta er egið hugskot. Eg havi ongantíð hoyrt Nólsoy nevnda sum møguliga floghavn, og tað er faktiskt ótrúliga løgið. Har er stórt, slætt øki við góðum veðurlagið og góðum innflúgvingarmøguleikum. Og øki liggur mitt í miðøkinum, greiðir Magnus Hansen frá.

Sambært Magnusi Hansen hevur Nólsoy nógvar fyrimunir í mun til Glyvursnes. Slætta økið á Borðuni er nógv størri og gevur møguleika fyri einari veruligari altjóða floghavn, samstundis sum talan, sambært arkitektinum, er um eina ætlan, sum ikki forðar fyri aðrari bygging.

- Um flogvøllur verður



Kortið er ogn hjá K